# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 28.05.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:
Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Tórur Didrik Djurhuus
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Uni Rasmussen



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 38/25 | 25/00255-3 | Broyting av býarplani – matr. nr. 381, 380, 378 og part av 379 í Leirvík | 2 |
| 39/25 | 25/00225-1 | Eykajáttan apríl 2025 - 25/00225 | 3 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 38/25 Broyting av býarplani – matr. nr. 381, 380, 378 og part av 379 í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.05.2025 | 22/25 | 25/00255-3 |
| 2 Býráðið | 28.05.2025 | 38/25 | 25/00255-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur arbeitt við at menna eina skipaða loysn fyri seyðahald í Leirvík. Endamálið er at savna seyðahald á einum avmarkaðum og hóskandi øki, ið liggur uttan fyri bústaðarøki, og soleiðis tryggja eina samsvarandi nýtslu av landareali í mun til aðrar samfelagslig áhugamál, herundir trivnað og bústaðarbygging.

Tað økið, ið er ætlað til endamálið, fevnir um umleið 17.000 m² og verður longu í dag partvís nýtt til seyðahald. Mett verður, at staðsetingin er væl egnaður til endamálið, bæði landbúnaðarfrøðiliga og í mun til verandi býarplanlegging fyri Leirvík. Økið hevur natúrlig mørk og liggur í góðari frástøðu frá verandi og framtíðar bústaðarbygging.

Í sambandi við framtíðar nýtslu av økinum, hevur kommunan gjørt nakrar ásetingar og treytir, sum ikki eru fevndar av verandi byggisamtykt. Talan er um nýtslu til landbúnaðarligt endamál, har serligar reglur fyri seyðahald skulu galda. Tískil er neyðugt at tillaga byggisamtyktina við at leggja økið inn sum eitt nýtt, sermerkt øki til seyðahald.

Við hesum verður lagt upp til at gera eina byggisamtyktarbroyting, við viðkomandi ásetingum um nýtslu, byggibýti o.a.

Sí viðfestu skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at góðkenna hesa byggisamtyktina fyri øki N: Seyðhúsaøki í almennu byggisamtyktini.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 21. maj 2025</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

## 39/25 Eykajáttan apríl 2025 - 25/00225

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 23/25 | 25/00225-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2025 | 36/25 | 25/00225-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.05.2025 | 26/25 | 25/00225-1 |
| 4 Býráðið | 28.05.2025 | 39/25 | 25/00225-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir. Íalt er talan um eykajáttanir á 8.630.000,00 kr. harav 6.180.000,00 kr. eru íløgur sum verða fluttar frá 2024 til 2025.<br><br>Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 30 mió. settar av út- og umbygging av skúlanum í Leirvík. Hendan játtanin verður ikki øll brúkt og tí kunnu eykajáttaninar fíggjast av hesi konto.<br><br>**Ískoyti 22.05.2025**<br>Eingin broyting frá 1. viðgerð |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Um eykajáttaninar verða fíggjaðar soleiðis sum tilmælt verður, hevur hetta ikki nakrar aðrar fíggjarlagar avleiðingar enn at løgujáttanin til skúlan í Leirvík minkar, og aðrar játtanir hækka. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajátttanir samb. fyriliggjandi yvirliti, og at peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511-(Fólkaskúlin) |

### Fíggjarnevnd 28. apríl 2025
Einmælt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, umframt at veita eykajáttan á kr. 104.000 vísandi til mál nr. 24/00173 - *Umsókn um stuðul til matveiting - Verdandi* og eykajáttan á kr. 2.000.000 til eldraøkið - Giljagarð

### Býráðið 30. apríl 2025
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

### Fíggjarnevnd 26. mai 2025
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð. Harumframt mælir fíggjarnevndin til at veita eykajáttan á 750.000,00 kr. til at klæða nýggja róðrarneystið.